## Vit selja ikki!

Franck Ribery hevur seinasta mánaðan verið settur í samband við fleiri evropeisk stórfeløg. Millum annað hevur verið at hoyrt, at Manchester United, Chelsea, Manchester City og Real Madrid hava ætlað sær franska landsliðsleikaran. Men tað verður eftir øllum at døma av ongum. Leiðslan krevur heilar 85 milliónir pund, sum er sami prísur, ið Real Madrid keypti Cristiano Ronaldo fyri. – Vit vilja ikki selja Ribery, um hetta ikki verður prísurin, sigur umboðsmaður frá Bayern Munich.




## Berbatov verður betri

Sir Alex Ferguson, venjari hjá Manchester United, vónar, at Dimitar Berbatov verður pengarnar verdur í komandi kappingarári. Tí tað hevur hann ikki higartil. – Hann hevði tað trupult í fjør, og møguleika nýttu vit hann á skeivum plássi, sigur Alex Ferguson við Mirror, og venjarin tekur fulla ábyrgd av, at Berbatov ikki hevur verið verdur tey 30 millión pundini.

# Frúgvin vardi Miðvág



Tað er ikki á hvørjum ári, at kvinnurnar úr Miðvági vinna FM. Tað er bara komið fyri eina ferð áður

**Kvinnurnar umborð á 5-mannafarinum megnaðu tað, sum menninir umborð á 6-mannafarinum ikki megnaðu**

5-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Tað var tætt, og tað var spennandi undan ólavsøkuróðrinum, og finalan gjørdist framúr. Fyritreytirnar vóru, at Frúgvin úr Miðvági og Erla Kongsdóttir úr Fuglafirði kappaðust um FM heitið. Tann av hesum báðum kvinnubátunum, sum fór fyrstur um málið vann FM.

Frúgvin reyk avstað, tá ið startskotið hevði ljóðað. Erla Kongsdóttir var ikki so væl fyri í startinum. Men tá ið bátarnir róðu fram við Molanum bjóðaðu tær úr Fuglafirði av, og eina løtu tóktist tað sum um, at tað skuldi eydnast grøna bátinum at vinna FM heitið til Fuglafirðar.

Tað eydnaðist ikki, tí Frúgvin svaraði orduliga aftur. Munurin var minni enn ein hálv bátslongd, men tað var eingin ivi um, hvør hevði vunnið. Eingin annar bátur luttók í kappingini um sigurin á Ólavsøku. Ritan, sum vann bronsuplássið, var næstan tvær bátslongdir aftanfyri Erlu Kongsdóttir.

Tað er ikki á hvørjum ári, at kvinnurnar úr Miðvági vinna FM. Tað er bara komið fyri eina ferð áður. Tað var í 2000, tá ið Frúgvin vann allar seks róðrarnar og harvið FM við 42 av 42 møguligum stigum. Ta ferðina høvdu næstu kappingarneytarnir – Tjaldrið, Hvassi og Ørnin – 21 stig ella bara helmingin av stigatalinum hjá Frúnni. Munurin var ógvuliga stórur, hóast tað skal havast í huga, at tá var skipanin soleiðis, at vinnarabáturin vann sjey stig, og at tann næsti vann fimm stig.

Í ár hevur tað verið munandi tættari. Frúgvin hevur vunnið fýra róðrar, og Erla Kongsdóttir hevur vunnið tríggjar róðrar. Frúgvin er meistari við 46 stigum, og Erla Kongsdóttir var næst við 45 stigum. Tað fær illa verið tættari!

# Sjey talið fyri fyrstu ferð á Argjum

**Argjabáturin var tann einasti, sum megnaði at vera fyrstur á mál í øllum sjey FM róðrunum**

8-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*



Longu á Vestanstevnu var tað greitt, at Argjabáturin hevði vunnið FM fyri 9. ferð. Undan ólavsøkuróðrinum var spurningurin, um tað fór at eydnast argjamonnum at vinna FM við fullum stigatali. Tað eydnaðist. Argjabáturin vann aftur hesa ferð.

Sigurin var ikki so trivaligur, sum hann hevur verið fyrr í summar, men tað hevði minni at siga. Árnfirðingur og Heiðabáturin, sum luttók fyri fyrstu ferð í ár, hingu leingi uppií, men á teimum síðstu tvey hundrað metrunum var als eingin ivi, og Argjabáturin var tað mesta av einari bátslongd undan Árnfirðingi, tá ið teir fóru um málið.

Argjabáturin skrivaði søgu ólavsøkuaftan. Eina ferð áður hevur hann vunnið allar róðrarnar. Tað var í 2000, tá ið 7. FM heitið varð tryggjað. Í 2004 vann Argjabáturin FM fyri 8. ferð. Tá kendist FM sigurin neyvan so søtur, sum hann gjørdi tað hesa ferð. Undan Ólavsøku hevði Argjabáturin vunnið allar róðrarnar, men á Ólavsøku snýtti Kvívíkingur FM vinnaran.

Orsøkin, til at Argjabáturin hesa ferð skrivaði søgu, er, at hetta er fyrsta ferðin, at báturin hevur vunnið allar sjey FM róðrarnar.

**Undan ólavsøku hevði Argjabáturin vunnið allar róðrarnar, men á ólavsøku snýtti Kvívíkingur FM vinnaran**